# Lena Anderssen á G!

**Fløguaktuella Lena Anderssen verður millum nøvnin á ársins G!Festivali, hetta kunnger festivalurin í dag. Hon fer á pall á G! við fullmannaðum bólki, og sambært festivalinum, verður hetta einasta høvið at uppliva hetta í summar.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóast Lena seinnu árini hevur verið millum bestu og best umtóktur tónleikanøvnini á føroyska tónleikapallinum, so hevur hon ongantíð spælt á festivalinum á Gøtusandi. Hetta verður tó broytt í ár, tá Lena við bólki kemur á gátt. Lena hevur júst givið fløguna Let Your Scars Dance út. Henda fløga er nógv tann besta útgávan, ið songkvinnan hevur latið úr hondum higartil, og ber boð um eina songkvinnu, ið er vorðin búgvin til altjóða gjøgnumbrot. Seinasta fløgan Can't Erase It hevur verið nógv spæld í útvarpi uttanlands og hevur sent Lenu á kosertferðir kring heimin. Men nýggja fløgan er somikið nógv betur, at heimurin tykist víðopin fyri Lenu.

## Gleðir seg

Lena fer á pallin á Gøtusandi fríggjakvøldið 20. juli. Hetta verður eisini eina høvið hjá føroyingum hetta summarið at hoyra Lenu við fullmannaðum bólki.

Framførslan hjá Lenu verður startskotið til stóra konsertferð í Evropa, sum føroysk-kanadiski sangfuglurin og sangskrivarin fer undir í september.

- Eg gleði meg ótrúliga nógv at spæla á G! Nakrar av mínum bestu upplivingum bæði sum lurtari og performari, hava verið í Gøtu. Eg spældi fleiri ferðir í Losjuni, tá Grót var nýstovnað, og eg minnist aftur á hesi kvøldini sum nakað heilt serligt. Tað er ótrúligt at hugsa sær, at fantastiskir artistar sum Eivør, Clickhaze, Høgni Lisberg, Boys In A Band, Gestir, Knút Eysturstein Háberg og onnur – øll eru sprottin úr hesum umhvørvinum eftir bert fáum árum. Og G! festivalurin er "the icing on the cake!", sigur Lena um tað at skula spæla á G! á fyrsta sinni.

- Tá eg hugsi um hugnaligu losjukonsertirnar og so komandi konsertina á Gøtusandi, kennist tað sum at vera komin allan sjónarringin runt. Eg gleði meg, sigur Lena.

## Droymdi heitið

Tað var neyvan heldur av tilvild, at Lena droymdi seg fram til heitið "Let Your Scars Dance". Tá hon googlaði tað, fanst ongin setningur á google, ið ljóðaði júst so.

- Eg tók tað sum tekin um, at fløgan skuldi hava hetta heitið, sigur Lena, sum við "Let Your Scars Dance" eisini hevur skrivað eitt slag av føroyskari tónleikasøgu. Hon er nevniliga fyrsti føroyski artisturin, ið hevur spælt inn tónleik í heimskendu Abbey Road Studio 2 í London.

# Danskt Bon Jovi og R'n'B í byin.fo

**Danska R'n'B stjørnan Alex vitjar byin.fo hetta vikuskiftið. Hann fer á pall í Cippo fríggjakvøldið og í Eclipse leygarkvøldið, samstundis er Bon Jovi á skránni í REX har Bon Jovi Jam úr Danmark vitjar.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hetta vikuskiftið vitja tvey útlendsk tónleikanøvn hjá byin.fo. Danski R'n'B sangarin Alex vitjar á øðrum sinni í Føroyum, og spælir hesaferð tvær konsertir, hitt navnið er Bon Jovi jam, somuleiðis úr Danmark, ið undirheldur í REX í kvøld og leygarkvøldið.

## Yngri gestir í Cippo

Rúni Djurhuus frá byin.fo sigur við planet.fo, at tey hava sett Alex á pallin í Cippo í kvøld og í Eclipse í annaðkvøld. Síðsta vikuskiftið roydni byin.fo á fyrsta sinni, at lata dyrnar í Cippo upp fyri yngri gestum. Hetta riggaði sera væl.

- Tey 15-18 ára gomlu hava einki stað at fara í dansa, og vit hildu tí, at tað var upplagt, at lata eitt av okkara støðum upp fyri teimum. Tí royndu vit hetta síðsta vikuskiftið, og fólk tók ótrúliga væl ímóti tí, sigur Rúni Djurhuus og heldur fram:

- Vit høvdu ikki færri 200 ung har seinasta fríggjakvøld, og vit fingu so nógvar góðar reaktiónir. Nógv foreldur hava eisini ringt til okkum og takkað okkum fyri, at vit hava gjørt hetta, so tað eru vit øgiliga glað fyri tað. Hetta gevur okkum eisini ein eyka møguleika hetta vikuskiftið. Vit kunnu hava Alex, at spæla til rúsfrían dans í Cippo fyri teimum yngru í kvøld og so hava hann í Eclipse í annaðkvøld, har hann spælir fyri teimum, sum eru yvir 20 ár. Sostatt er talan um tveir ymiskar bólkar av fólki, og tí ber til at hava eitt útlendsk navn tvey kvøld á rað í Havn, vísir Rúni á.

## Danskt R'n'B

Alex er kendasta andlitið í donskum R'n'B. Hann gjørdist fyrst kendur í heimlandinum, tá hann sum luttakari í Popstars valdi at fara burtur úr sjónvarpssendingini fyri at royna sína egnu yrkisleið. Hetta hevur gingið væl fyri hann. Nýggjasta fløga hansara var á donskum, og fekk góða móttøku bæði millum fólk og fjølmiðlar. Hon varð skapt í samstarvi við kenda danska framleiðslusamstarvið MadnessForReal, ið m.o. hava arbeitt við Black Eyed Peas og Ice Cube.

Ummælarnir vóru á einum máli um, at her var talan um eina frálíka fløgu frá einum framúrskarandi sangara. Dj-Neon verður eisini í Cippo fríggjakvøldið og leygarkvøldið er DJ-Eddie í Eclipse.



*Alex hevur á seinnu fløgu síni vunni sær nógvar fjeppara bæði millum plátukeyparar og ummælarar*

# Asfalt kunnger fimm nøvn

**Nú bert tríggjar vikur er til Asfalt fer av bakkastokki eru 20% av skránni kunngjørd, og hon sær higartil spennandi út.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Asfalt hevur kunnger nú fimm nøvn afturat á skránna fyri tónleikatiltakið í Tórsgøtu. Her er harður treskimálmur, rokkur í strømmum kovboybuksum, kristin poppur og eitt kór. Við øðrum orðum Sic, Boys In A Band, Torkil Mørkøre, Gunnar G. Guttesen og Vox

## Strammar kovboybuksir

Boys In a Band eru ein av best umtóktu bólkunum í løtuni. Teir siga seg spæla kovboyrokk, sum stutt sagt er ein blanding av aggandi gomlum bluestónleiki og spildurnýggjum rokki. Bólkurin er fullkomiliga elektriskur á palli, og øll vita, at tað er nyttuleyst at standa ímóti. Boys In A Band knúlva teg sum áhoyrari niður. Eftir AME framførsluna í Kagganum fyri kortum, vórðu teir bókaðir til ikki færri enn tríggjar festivalar niðri í summar, umframt stóran áhuga millum útlendsk plátufeløg. Teir eru somuleiðis vælumtóktir á 15 teim bestu, hava vunnið Planet Award fyri at vera besti nýggi bólkurin í fjør.

## Vakur larmur

Síðan SIC gav fløguna "Pandemonium" út fyrr í ár, hevur bólkurin veruliga havt undanvind. Í føroyskum miðlum hevur fløgan fingið avbera góð ummæli og eisini uttanfyri klettarnar hevur áhugin fyri SIC verið stórur. Avstralska alnet-útvarpsrásin Dark Cloud Radio hevur spælt SIC javnan. Við "Pandemonium" hevur Sic skrivað seg inn í føroyska tónleikasøgu. Tí eru SIC sjálvandi eisini millum høvuðsnøvnini á ársins Asfalt. Útgávan er framúrskarandi og brýtur upp úr nýggjum innan føroyskan tónleik. Sjangran er harðligur melodiskur treskimálmur, ella sum tey flestu vilja vera við: bara sera vakran larm

## Fólkaligur rokkur

Torkil Mørkøre er best kendur frá vælumtóktu útgávu sínari, A Matter of Time. Tónleikurin, sum hann og vinir fara at framføra á Asfalt, er fyrst og fremst sprottin úr gleðiboðskapinum um Jesus Kristus. Tónleikastílurin er west coastpopprokkur, men fer hann eisini eitt sindur yvir í fólkaligan rokk. Við Torkili á palli vera Beddi Hansen, Leivur Vitalis og Mikkjal Hvannastein.

## Framtíðin er avgerandi

Gunnar G. Guttesen hevur spælt og framleitt tónleik fyri mong ígjøgnum árini. Hann er fulltíðar tónleikari og framleiðari. Gunnar er fullkomiliga originalur. Hann peikar á, at tað er ikki so umráðandi, hvat hann hevur gjørt, men heldur, hvat ið hann fer at gera. Og tað gleða vit okkum sum vera man sjálvandi til at vera vitni til á ársins Asfalt. Við Gunnar á palli vera Kristoffur Mørkøre og Brandur Jacobsen. Torført er at siga, júst hvønn tónleikastíl Gunnar spælir, men er trygt at siga, at Gunnar kemur altíð við eini fjølbroyttari konsert.

## Av bestu gospelkórum

Gospelkórið VOX hevur rót í Heimamissiónini. Tað telur sekstan sangarar pluss eitt sjeymans orkestur. Kórið hevur sungið saman í skjótt eitt áratíggju. VOX hevur m.a. sungið tvær konsertir saman við navnframu gospelsangarinnuni Ettu Cameron og eisini við heimskenda gospelsangaranum Jessy Dixon. Kórið er millum tey allarbestu føroysku.

## Skráin tekur skap

Skráin telur nú 14 nøvn, hetta er tó bert eini 20% av teimum út við 60-70 nøvnunum, ið fara á pall í døgunum 7. og 8. juli. Umframt hesi fýra nøvnini eru frammanundan kunngjørd Budam, Martin Joensen og Hinir, Petur Pólsson, Side Effect, Lív Hansen, Proclaim, Martin í Grund, Rannvá Jacobsen og Nátt.